SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*–Vit royna at noyða forsetan at taka hermenninar heim og at kvala ætlanir hansara*

*(John Murtha, senatorur)*

# Grýluveitsla í skugganum av harðskapi



*Vanlig býarmynd í Rio de Janeiro: Alvápnaðir løgreglumenn í bardaga við rúsevnabrotsmenn.*

**Í Rio de Janeiro fyrireika tey seg til ta árligu veitsluna, men býarmyndin ber ikki boð um veitsludám og skemt.**

Sunnudagin og mánadagin verður tann árliga grýluveitslan í Rio, og teir seinastu dagarnar hava fólk í túsundatali fyrireikað seg aftur við sambatónleiki. Men samstundis er býurin merktur av tí altsamt veksandi harðskapinum, og millum tey grýlukløddu fólkini ganga alvápnaðir løgreglumenn og hermenn.

Mánanáttina skutu løgreglumenn tvey fólk í fátækrabýarpartinum Alemao, eftir at løgreglumenn og rúsevnisbrotsmenn høvdu skotið eftir hvør øðrum í fleiri tímar. Í skotbardaganum varð streymveitingin oyðiløgd, og síðani hevur býarparturin hvørki havt streym ella vatn.

Skotbardagar millum løgreglumenn og hermenn øðrumegin og rúsevnisbrotsmenn hinumegin eru gerandiskostur í Rio de Janeiro. Sambært myndugleikunum eru tað brotsmenninir, sum leypa á løgregluna, og tær áhaldandi skotríðirnar hava fingið fólk í stórum tali at flýggja úr býnum. Tey, sum velja at halda á, tora ikki út fyri dyr, eftir at tað er vorðið myrkt.

Tey, sum skipa fyri grýluveitsluni hesaferð, stúra fyri harðskapinum. Vanliga plaga tær stóru skrúðgongurnar í miðbýnum at fáa frið, men fyrireikararnir bera ótta fyri, at okkurt skal henda.

Brasilsku myndugleikarnir vænta, at umleið 700.000 ferðafólk koma til Rio í sambandi við grýluveitsluna. Tey stóru tiltøkini verða sunnudagin og mánadagin, men veitslan byrjar í dag.

# Bush undir trýsti

**Fyri fyrstu ferð er líkt til, at eitt uppskot ímóti krígnum í Irak fær meiriluta í amerikonsku Kongressini**

Í kvøld skal Umboðsmannatingið í Washington atkvøða um eitt uppskot, sum skal boða George W. Bush, forseta frá, at tingið er misnøgt við ætlan hansara at senda 21.500 hermenn afturat til Irak.

Demokratarnir hava meiriluta í Umboðsmannatinginum, og fleiri republikanarar hava boðað frá, at teir fara at atkvøða fyri uppskotinum. Samtyktin er ikki bindandi fyri forsetan, men verður uppskotið samtykt, er tað fyrstu ferð, at Kongressin atkvøður ímóti krígnum í Irak síðani innrásina í 2003. Tað kann sambært eygleiðarum leggja lunnar undir eina bindandi samtykt.

Høvuðsmaðurin aftan fyri uppskotið er demokratiski senatorurin John Murtha. Hann er formaður í nevndini, sum hevur eftirlit við útreiðslunum hjá verjumálaráðnum Pentagon, og sum fyrrverandi hermaður í Vietnam hevur hann gott samband við fleiri í herleiðsluni. Hann hevur sagt, at hann ætlar sær at fáa enda á amerikanska krígnum í Irak.

John Murtha og meirilutin í Umboðsmannatinginum hava undirtøku millum fólk. Meiningakanningar vísa, at 52 prosent av amerikanarunum vilja hava hermenninar úr Irak skjótast gjørligt.



*George W. Bush hevur nógv at hugsa um í hesum døgum.*

## STUTT SAGT

### Skal viðurkenna Ísrael

Amerikanska stjórnin hevur gjørt palestinska forsetanum, Mahmoud Abbas, púra greitt, at USA fer ikki at samstarva við ta ætlaðu palestinsku savningarstjórnina, fyrr enn Hamas viðurkennir ísraelska ríkið. Palestinskir talsmenn søgdu í gjár, at Abbas hevur fingið at vita úr Washington, at USA fer ikki at sleppa sambandinum við forsetan, men at talan verður ikki um nakað samband ella samstarv við stjórnina, fyrr enn Hamas viðurkennir Ísrael. Mánadagin skal Condoleezza Rice, uttanríkisráðharri, hitta Mahmoud Abbas og ísraelska forsætisráðharran, Ehud Olmert, og tá verður spurningurin um palestinsku savningarstjórnina og viðurskiftini millum Hamas og Ísrael høvuðsevnið.

### Aeroflot skiftir út

Russiska flogfelagið Aeroflot hevur gjørt av at skifta fleiri av teimum gomlu sovjetsku Tupolev-flogførunum út við vesturlendsk flogfør. Aeroflot hevur í dag 14 flogfør av slagnum Tu-134, sum vórðu bygd í gamla Sovjetsamveldinum, og tey verða øll tikin úr flúgving innan árslok í ár. Aeroflot hevur eisini fleiri flogfør av slagnum Tu-154, og nøkur av teimum verða eisini tikin úr flúgving í ár. Russiska flogfelagið hevur fyrr boðað frá, at tað fer at keypa 45 flogfør av slagnum Aitbus320 og 22 flogfør av slagnum Boeing 787.

### Ja til skjøldur

Polski forsætisráðharrin, Jaroslav Kaczynski, og tvíburðabróður hansara, Jech Kaczynski, sum er forseti, taka undir við, at USA sleppur at seta ein rakettverjuskjøldur upp í Póllandi. Russland hevur mótmælt amerikonsku ætlanini, og meiningakanningar hava víst, at flestu póllendingar eru eisini ímóti skjøldrinum. Fólk bera ótta fyri, at ein slíkur verjuskjøldur fer at gera Pólland til eitt álopsmál.